# Flótandi mark millum kunning og propaganda



**Kunningarráðgevin hjá fullveldissamgonguni, Sjúrður Skaale, heldur tað vera ógvuliga torført at gera av, nær ein fyrisiting kunnar borgaran, og nær hon fremur politiska propaganda. - Í politikki eru altíð deildar meiningar og tað ger, at markið millum upplýsing og propaganda er ógvuliga flótandi, heldur Sjúrður Skaale**

KUNNINGARRÁÐGEVAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Orðið politisk propanganda feyk um allar geilar í løgtinginum mikudagin. Tingmenn gjørdust rættiliga heitir undir munnliga fyrispurninginum hjá Høgna Hoydal til landsstýrismannin, Bárð Nielsen. Formaður Tjóðveldisfloksins helt fyri, at tíðindaskrivið frá landsstýrismanninum í samband við

fíggjarlógaruppskotið var villeiðandi fyri almenningin.

Umboð fyri Tjóðveldisflokkin róðu framm undir, at Bárður Nielsen misnýtti fyrisitingina til at fremja egin politisk áhugamál. Millum annað førdu umboðini fyri Tjóðveldisflokkin fram, at upplýsingarnar í tíðindaskrivinum einki hald hava í veruleikanum og geva eina ranga mynd av føroysku fíggjarstøðuni. Niðurstøðan var greið: Bárður Nielsen førdi partapolitiska propaganda fyri almennar pengar.

Løgtingsumboð fyri bæði Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin svaraðu aftur og løgdu Tjóðveldisflokkin og undanfarnu samgongu undir at hava gingið á odda við politiskari propaganda, tá stríðið um fullveldið var í hæddini. Bæði javnaðartingmaðurin, John Johannessen, og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, søgdu seg ikki skilja skuldsetingarnar frá Tjóðveldisflokkinum. Teir vístu á, at fullveldissamgongan hevði nýtt nógvan pening til marknaðarføring av fullveldisætlaninum og tí var tað undrunarvert, at Tjóðveldisflokkurin nýtti peikifingurin, tá júst hesin flokkur gekk á odda fyri politiskari propaganda.

## Flótandi

Sjúrður Skaale starvaðist sum kunningarráðgevi hjá føroyska landsstýrinum undir samráðingunum við donsku stjórnina í 2000. Hansara uppgáva var at svara spurningum frá útlendskum og føroyskum journalistum og geva teimum tað tilfar, teir bóðu um. Harumframt skrivaði hann tíðindaskriv fyri landsstýri, og dagførdi heimasíðuna "fullveldi.fo". Afturat hesum skrivaði Sjúrður Skaale eisini framløgur og røður fyri landsstýri.

Sjúrður Skaale skrivaði eisini bóklingin "Frá heimastýrið til fullveldið", sum varð sendur í hvørt hús í 2000.

Í løgtinginum mikudagin var hesin bóklingur fleiri ferðir havdur á lofti. Hann var nevndur politisk propaganda frá fullveldissamgonguni, og ógvuliga deildar meiningar vóru um bóklingin.

Fleiri løgdu fullveldissamgonguna undir at føra politiskt propaganda fyri skattgjaldarans pening. Boðini frá fullveldislandsstýrinum vóru, at talan var um kunning í samband við ætlanina um at skipa Føroyar sum fullveldisríki.

Sjúrður Skaale, sum ritaði bólkingin, heldur ikki, at talan var um propaganda.

- Bóklingurin var skrivaður við støði í Hvítubók, sum óheftir serfrøðingar høvdu gjørt. Og eg haldi ikki, at nakað stóð í bóklinginum, sum ikki samsvarar við tað, sum stóð í Hvítubók. Tí haldi eg, at bóklingurin var kunning, og ikki propaganda, sigur hann.

Hinvegin ásannar Sjúrður, at markið millum politiska kunning og propaganda er ómetaliga ringt at seta, tá ein fyrisiting vendir sær til almenningin.

- Eg havi eitt nú skrivað tvær nýggjársrøður fyri fyrrverandi løgmann. Slíkar røður, eru tær góðar, geva tí persóninum, sum ber tær fram, nógva positiva umrøðu. Men eru tær propaganda? Eg veit ikki. Tær eru ið hvussu er stór politisk reklama, sigur Sjúrður Skaale.

- Vit mugu ásanna, at tað í politikki altíð eru ymiskar meiningar um, hvussu veruleikin sær út, og tað ger, at tað altíð eru ymiskar meiningar um, hvat er upplýsing, og hvat er propaganda. Markið er ógvuliga flótandi, sigur Sjúrður Skaale.

Hann vísir á, at serliga í fullveldisspurninginum eru sera ymiskar meiningar, og tí er ógjørligt at upplýsa um tað málið uttan so, at onkur heldur talan vera um politiska propganda.

- Orsøkin til, at so nógv orðaskifti er um hetta er, at vit royna at halda uppi eini illusión um, at tað ber til at skilja sundur politikk og umsiting. Tvs. at tá ein politisk umsiting sigur okkurt, so skal tað vera púra óheft. Men tað ber ikki til. Politikkur er politikkur og landsstýrismenn og embætismenn arbeiða við politiskum ætlanunum, sum nógv ikki taka undir við. Í USA hava tey eina politiska umsiting, so tá er einki raffla um, greiðir Sjúrður Skaale frá.

## Ikki misnýtast

Sjúrður Skaale var formelt settur í starv í løgmansskrivstovuni undir fullveldislandsstýrinum. Hann greiðir frá, at allar frágreiðingar og tíðindaskriv vóru gjørd í samráð við politikarar og embætisfólk á løgmansskrivsstovuni.

- Tað er hetta, sum eg haldi vera tað avgerandi: Einki má berast fram, sum er faktuelt skeivt. Tilfarið, sum verður latið borgarunum má altíð hava dekning í stovninum. Og politikarar mugu ikki misnýta fyrisitingina og teir almennu pengar, teir hava atgongd til, til persónligan fyrimun, sigur Sjúrður.

Sjúrður heldur, at dømi eru um, at slík misnýtsla er farin fram.

- Eg haldi, at eitt nú Anfinn Kallsberg misnýtti løgmansskrivstovuna til egnan persónligan fyrimun, tá hann persónliga fór í mótálop ímóti rithøvundunum av bókini Skjót Journalistin. Kallsberg legði sítt álop á heimasíðuna hjá Løgmansskrivstovuni, men talan var ikki um tíðindi frá tí almenna til borgaran. Talan var um at Anfinn Kallsberg misnýtti løgmansskrivstovuna og løgmansembæti til eitt persónligt álop á tveir journalistar. Tað líktist svarta ongum.

- Málið um Bárð Nielsen kenni eg ikki so væl, men um Bárður í hasum nógv umrødda tíðindaskrivinum hevur borið fram ósannindi, so er yvirhøvur eingin ivi um, at hann hevur misnýtt sítt embæti. Og so eigur tað sjálvsagt at fáa avleiðingar, heldur Sjúrður Skaale at enda.

## Sagt í tinginum mikudagin:

**Høgni Hoydal:**
*Tað, sum verður sagt frá aðalstýrunum má verða sakliga og faktuelt rætt og tað er tað ikki í hesum tíðindaskrivinum.Bárður Nielsen hevur við skattgjaldarans pengum betalt externum freelance fjølmiðlafólki fyri at gera faktuelt skeivt tíðindaskriv og hetta er ein principiell og óheppin gongd.*

**John Johannessen:**
*Alt byrjaði við, at fólk ikki tímdu at arbeiða sum fjølmiðlafólk, tí tey vunnu meir pening við at arbeiða sum ráðgevar fyri almennu Føroyar. Her havi eg ein bókiling, sum eitur frá Heimastýri til Fullveldi, og hann má hava kosta einar 50.000 krónur, so at leggja eftir Bárði Nielsen fyri at føra sambandspropaganda, er eitt sindur við síðurnar av.*

**Kaj Leo Johannesen:**
*Tá mann tosar um eksterna ráðgeving, so kendi mann væl til eksterna ráðgeving í undanfarnu samgongu. Tá brúkti mann 50 mio. krónur til fullveldi og fullveldismarknaðarføring.*

**Bárður Nielsen:**
*Tá hugsað verður um, at 50 mio. krónur vóru nýttar til politiskt propanganda hjá undanfarnu samgongu, skilji eg einki av, at mann skýtir eftir tí, at eitt fjølmiðlafólk hevur eftirhugt eitt tíðindaskriv, sum er gjørt av embætisverkinum og er politiskt litað av landsstyrismanninum, sum sitiur har. Hetta er at yvirreagera kraftiga.*

**Torbjørn Jacobsen:**
*Poengið er, at Fíggjarmálaráðið ikki stendur innifyri tí sum stendur í skrivinum og tí er skrivið partapolitiskt propanganda hjá Bárði Nielsen og Sambandsflokkinum. Heldur Bárður Nielsen, at tað er rætt, at almennu Føroya rinda fyri propanganda hjá Sambandsflokkinum?*



# Skipini hjá Strandferðsluni aftur hótt við at verða løgd

**Finna Fíggjarmálaráðið og Skipara- og navigatørfelagið, ikki semju á fundi, sum verður týsdagin, verða skipini hjá Strandferðsluni løgd**



SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Tað eru ikki meiri enn góðar tvær vikur síðani, at verkfall ella verkbann hótti við at leggja skipini hjá Strandferðsluni.

Hetta var beint fyri páskir. Men longu nú er aftur galið.

Í næstu viku er aftur vandi fyri, at bæði Smyril og øll hini skipini hjá Strandferðsluni verða løgd av verkfalli ella verkbanni. Somuleiðis er eisini vandi fyri at havrannsóknarskipið, Magnus Heinasen, verður lagdur.

Beint fyri páskir var tað ósemja um lønina hjá maskinmeistarunum, sum sigla við Strandferðsluni, sum hótti við at leggja flotan hjá Strandferðsluni.

Nú er tað ósemja um viðurskiftini hjá skiparunum og stýrimonnunum hjá strandferðsluni, sum hóttir siglingina.

Sáttmálin ímillum Fíggjarálaráðið og Skipara- og Navigatørfelagið gekk út 1. desember og síðani hevur verið samráðst um nýggjan sáttmála.

Higartil hava samráðingarnar verið til fánýtis og tær eru fyribils endaðar við, at semingsmenninir komu uppí.

Semingsmenninir eru Christian Andreasen, løgfrøðingur og Árni Ellefsen, grannskoðari.

Teir báðir hava útsett eitt møguligt verkfall og teir hava kallað partarnar saman til semingsfundar týsdagin.

Tá verður samráðst til tað røkkur ella støkkur. Tað merkir sostatt, at fæst ikki semja á fundinum týsdagin, er ongin sáttmáli og sostatt verða skipini hjá Strandferðsluni og Magnus Heinason, løgd.

Verða skipini hjá Strandferðsluni løgd, fer tað at raka alla siglingina hjá Strandferðsluni. Og tað skerst ikki burtur, at serliga Suðuroyggin verður hart rakt, tí har er nógv longst at sigla og møguleikarnir at sigla við øðrum bátum, sostatt avmarkaðir.

Men tað fer eisini at raka Norðoyggjar og Sandoynna hart, tí eisini har er vinnulív, sum hevur hart brúk fyri ferðasambandi hvønn dag.

## Vilja hava rættindi staðfest

Tá ið stígur kom í samráðingarnar ímillum Maskinmeistarafelagið og fíggjarmálaráðið beint fyri páskir, var høvuðsknúturin tað nýggja suðuroyarskipið.

Fíggjamrálaráðið kravdi at fáa nýggja suðuroyarskipið við í samráðingarnar, men tað vildi Maskinmeistarafelagið ikki.

Úrslitið gjørdist tann salomonska loysnin, at samráðingarnar um nýggja suðuroyarskipið vórðu útsettar til tíðliga í summar. Men hesuferð er hetta ikki trupulleikin.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og navigatørfelagnum, sigur, at nýggja suðuroyarskipið er við í samráðingunum.

Men kortini er tað júst nýggja suðuroyarskipið, sum størsta ósemjan er um.

– Yvirmenninir, sum sigla við Smyrli, sigla eftir einar 1:1 skipan. Tað merkir, at teir eru eina viku umborð og eina viku í landi.

*Tað eru ikki meiri enn góðar tvær vikur síðani, at bæði Smyril og hini skipini hjá Strandferðsluni vóru um reppið at verða løgd av ósemju á arbeiðssmarknaðinum. Nú er longu aftur galið*

– Hetta er ikki staðfest í sáttmálanum. Nú vilja vit hava tað tryggjað í sjálvum sáttmálanum, at teir skulu sigla 1:1. Men tað vil Fìggjarmálaráðið ikki, sigur Ellintur Abrahamsen.

Hann sigur, at hetta verður tann ringasti knúturin at loysa, nú nú partarnir fara til semingsfundfar týsdagin.

– Vit vilja ikki koma í ta støðu, at Fíggjarmálaráðið av sínum eintingum kann seta yvirmenninir at sigla eftir eini 2:1 skipan, ella enntá eini 3:1 skipan, har teir eru tvær ella tríggjar vikur umborð og eina viku í landi.

Men annars er eisini ósemja um eftirlønina hjá yvirmonnunum.

## Ongar viðmerkingar

Tummas Magnussen á Fíggjarmálaráðnum hevur ongar viðmerkingar til samráðingarnar.

– At gera føra samráðingar í fjølmiðlunum, er at draga tær út úr samráðingarhølunum og tað haldi eg ikki er rætt, sigur hann.

Vit ætlaðu annars at spyrja hann, hví Fíggjarmálaráðið ikki vil staðfesta tað í sáttmálanum, at yvirmenninir við nýggja Smyrli, skulu sigla eftir einari 1:1 skipan.

Nýggi Smyril er væl størri enn Smyril, sum nú er, og vilja politikarar spara, verður tað ein møguleiki at fækka túratalið ímillum Suðuroynna og Havnina, uttan at farmur, bilar ella ferðafólk koma at standa eftir.

Verður siglingin minni, minkar eisini arbeiðstíðin hjá yvirmonnunum og tað kann hugsast, at Fíggjarmálaráðið tí vil standa frítt fyri at koyra yvirmenninar yvir í eina 2:1 skipan, ella kanska eina 3:1 skipan, har yvirmenninir eru tvær ella tríggjar vikur umborð og eina viku í landi

Vit ætlaðu tískil eisini at spyrja Tummas Magnussen, um mótviljin hjá Fíggjarmálaráðinum ímóti at staðfesta eina 1:1 skipan í sáttmálanum, er tí at teir vilja standa fríari til at koyra yvirmenninir yvir í eina 2:1 skipan ella 3:1 skipan, so at effketiva arbeiðstíðin kann fylgja við, um so er at siglingin verður minkað.

Men hann hevur ongar viðmerkingar til samráðingarnar yvirhøvur.

# 200 pensjonistar hittast í Suðuroy

**Í dag verður eldradagur í Suðuroy, har pensjonistar úr øllum landinum hittast til gaman og álvara**

ELDRADAGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í dag hittast 200 pensjónistar úr øllum landinum til gaman og álvara á Tvøroyri.

Tað er árligi eldradagurin, sum í ár verður í skúlahøllini í Trongisvági við nógvum áhugaverdum á skránni.

Tað er Landsfelagið Pensjónista, sum skipar fyri degnum, men av tí at dagurin er í Suðuroy í ár, eru tað pensjónistafeløgini í Suðuroy, sum stíla fyri tiltøkunum á degnum.

Og har er nógv áhugavert á skránni, eitt nú fleiri áhugaverdir fyrilestrar.

Stevnan byrjar klokkan hálvgum eitt og tann fyrsti tímin fer til fáa súpan og langabreyð.

Klokkan hálvgum tvey fer Thorbjørn Lisberg, formaður í pensónistafelagnum HØFT í Suðuroyar Norðaru helvt at seta eldradagin.

Síðani er allur seinnaparturin er pakkaður við fyrilestrum. Talan er um heilar 10 fyrilestrar, men teir eru stuttir fyri at tað ikki skal verða ov langligt at lurta eftir.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fer at tosa um tey eldru í landspolitikki og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, fer at tosa um Almanna- og eldrapolitikk. Borgarstjórin í Vági og borgarstjórin á Tvøroyri fara at tosa um eldrapolitikk í teirra kommunum og leiðarin í heimarøktini í Suðuroy, Jeanna í Lágabø, fer at tosa um heimarøkt og tey eldru. Josvein Bech, prestur, fer at halda fyrilestur um átrúnað, tryggleika og eldru og Beinta Leo, kostráðgevari, fer at tosa um hvat tey eldru eiga at leggja dent á viðvíkjandi mati. Jórun Petersen, fysioterapeutur, fer at tosa um motiónsfimleik og sum rosinan í pylsuendanum, fer Sverri Midjord at tosa um at vera virkin, hóast ein er komin upp í árini. Og hann veit, hvat hann tosar um, tí fá eru so virkin sum nett-upp hann.

Um kvøldið verður so veitsla fyri luttakarunum við døgverða, skemti, sangi og aftaná verður farið upp á gólv.



*Tað plagar at verða stuttligt og hugnaligt, tá ið pensjónistar hittast í Suðuroy. Hendan myndin er frá jólaveitsluni*